# Fredrikk er uppi

**HEIMABRYGGJ**. Sambært nólsoyingum er gamli siðurin at bryggja Fredrikk um at doyggja út. Rúsdrekkasølan, skeinkistovan í bygdini og betri tíðir hava gjørt sítt til, at tað lættgjørda, bíliga og ólógliga nólsoyarbryggið er um at fara í søguna

*Dánjal Højgaard*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

Einaferð prutlaði tað í mongum kjallara í Nólsoy. Kaggarnir stóðu fullir við vatni, sukuri og geri, og tann grugguti drykkurin við tí eyðkenda gersmakkinum varð skonktur, tá ið menn høvdu verið á fjalli ella eftir nátum. Og handan teir fýra veggirnar.

Men í dag er langt millum prutlini.

Nú er lætt at keypa sær ein dropa í Rúsuni í Havn ella í kaffistovuni í Nólsoy. Og ráðini eru so mikið góð, at ólógliga kjallavirksemið er vorið mestsum óneyðugt.

Hetta er ið hvussu so er niðurstøðan, tá ið nólsoyingar í dag verða spurdir eftir navnframa drykkinum við tí luftríka heitinum.

- Fredrikk er útdeyður. Tað eru mánaðir og ár síðani eg sá hann seinast, er eitt afturvendandi svar. Aðrir eru knapt so avgjørdir. Halda tað vera ov tíðliga at avskriva Fredrikk heilt.

**Loynivirksemi**

Útgjørdir við bandupptakara og myndatóli eru vit farnir út til Nólsoyar at skatta dýpið. At bryggja Fredrikk – ella »at seta«, sum nólsoyingar rópa tað – er ólógligt. At stíga fram sum bryggjari við fullum navni, ógjørligt.

Fleiri, vit hava tosað við, leggja dent á, at Fredrikk altíð hevur verið hildin í loyndum. Húsarannsóknir hava verið í oynni fyrr. Tískil vilja næstan øll, sum vit hava fingið at úttala seg, bert luttaka við teirri treyt, at tey ikki verða nevnd á navni.

– Fyri tað fyrsta hevur tú slett ikki loyvi at bryggja tað, og fyri tað næsta hevur tú slett ikki loyvi at bjóða tað, sigur ein reyðdæmdur maður miðskeiðis í 50'unum, tá ið vit spyrja, um tað er onkur, sum eigur ein dropa av Fredrikki at bjóða.

Stutt eftir sita vit kortini heima hjá tí reyðdæmda, sum skeinkir okkum eitt glas av søtum vælsmakkandi rabarbuvíni, sum hann sjálvur hevur bryggjað. Fredrikk, greiðir hann frá, plagdi hann at bryggja sum yngri, tá hann var til skips. Hann var góður til at taka millum túrarnar, tá ið tú hevði gloymt at bestilt. Men til endans segði konan stopp.

– Fredrikk? Eg veit ikki. Onkur setur kanska ein kagga til okkurt fjall. Men tað hevur so at siga ikki verið síðani kaffistovan kom. Nú fært tú altíð ein ein lítlan, tá ið tú vilt, sigur hann, og fegnast um tað heimagjørda vínið.

– Rabarbuvínið er meira ordiligt. Tað eru faktisk tey fínu, sum fáast við tað, sigur hann og flennir at sær sjálvum.

**Bert tey fáu**

Í handilin hjá Gabriel Hansen halda tey seg kunna staðfesta, at heimabryggingin í Nólsoy er minkað síðani kreppan hasaði av. Tað er ikki sørt at sølan av sukuri, putursukri, geri og rosinum – sum eru grundtilfarið í Fredrikki – er minkað, sigur 68 ára gamli handilsmaðurin:

– Tað merktist, at ringar tíðir vóru í 90-unum. Teir, sum vildu hava ein dropa bryggjaðu sjálvir. Bryggingin dróg upp á seg síðst í 80-unum og undir kreppuni, sigur handilsmaðurin, og leggur diplomatiskur afturat:

– Mann kann jú ikki vita hvat, ið vørurnar verða brúktar til. Talan er jú um vanligar húsarhaldsvørur.

Ein garvaður Fredriksbryggjari um 40 ára aldur, heldur, at í dag eru tað bert ein lítil minniluti av nólsoyingum, sum í heila tiki leggur í at bryggja Fredrikk:

– Fredrikkur verður í dag bert nýttur av teimum, sum hava lítið av peningi og góða tíð. Aloftast eru tey arbeiðsleys ella pensionistar. Tey, sum hava meiri pening um hendur, velja heldur kaffistovuna ella Rúsuna, sigur hann.

**Bílig loysn**

Nær í tíðini nólsoyingar eru farnir at bryggja Fredrikk er ilt at siga nágreiniliga. Men greitt er, at siðurin hevur nøkur áratíggju á baki.

– Tað er fyri mær sum at tað er komið í mínum barnaárum í 30- og 40-unum. Ið hvussu so er minnist eg, at teir plagdu at bryggja rabarbuvín, Hellavín, sum teir róptu tað, minnist handilsmaðurin Gabriel.

Ein maður, ið róptist Hendrik kom við Hellavíninum. Hann sigldi úti í heimi og hevði vínrabarbur við sær. Hann hevði stóran rabarbugarð og bryggjaði vín, sum skuldi vera so gott, at havnarmenn komu til Nólsoyar, at keypa frá honum.

Okkurt bendir á, at nólsoyingar av álvara fara at bryggja Fredrikk einaferð síðst í 50-unum.

– Eg vildi hildið, at Fredrikk var upp á tað mesta í 60-unum, sigur Gabriel Hansen.

– Tá var tað heilt nógvastaðni, at tað stóð og kókaði, serliga eftir at sentralvarmin kom. Sentralvarmin hevði eina velduga ávirkan. Tá bleiv tað vist allastaðni, næstan í hvørjum kjallara. Tað vóru ikki so nógvir pengar tá, og harafturat var ringt at fáa hendur á rúsdrekka. So tað var ikki bestilt so nógv tá á døgum.

**Fíggindi í kjallaranum**

Í einum duraopi miðskeiðis í bygdini stendur ein 60 ára gamal maður. Hann greiðir okkum frá, at hann gavst at bryggja Fredrikk fyri skjótt tveimum árum síðani. Freistingin bleiv ov stór.

– Tað er einki av Fredrikki longur. Í hvussu so er grúiliga lítið. Í summar eru tvey ár síðani eg sjálvur koyrdi allar greiðirnar burtur. Tað virkar akkurát sum vín, men hevur tú ov nógv samband við tað, so verða tørnini ov long, greiðir hann frá.

– Hann er lættur at fáa hendur á, tá ið hann stendur í kjallaranum – og haraftruat bíligur. Fert tú í kaffistovuna ella í Rúsuna, at keypa tær eina fløsku av víni, so kostar hon kanska 45 krónur. Ein litur av Fredrikki kostar kanska 1 krónu og 20 oyru. So tað tað er bara at fáa sær eitt apparat afturat, sigur tann 60 ára gamli.

**Skaði fyri bygdina**

Í Nólsoy eru fólk sum halda, at Fredrikk hevur verið til stóran ampa fyri bygdina.

– Í allar hægsta grad. Fólk eru blivin alkoholikarar av hesum. Sjálvandi kundu tey blivið tað kortini, men Fredrikk hevur purrað uppundir, sigur ein 65-ára gamal uppilagstur sjómaður.

– Tað er so lætt. Tú kanst hava tveir kaggar standandi. Tá ið tann eini er útgeraður stendur tann næsti klárur at gera út. Sostatt kunnu teir fara niður í kaggan at fáa sær uttan íhald.

– Tað eru fleiri av teimum, sum hava drukkið illa og bryggjað Fredrikk, sum hava tikið í nakkan á sær sjálvum. Teir hava verið bangnir fyri at teir skuldu kollsigla av Fredrikki, sigur tann 65-ára gamli, sum sammetir Fredrikssiðin í Nólsoy við donsku ølmentanina:

– Fredrikk er ein ólukka fyri øll sum byrja at drekka. Tað er sum við danskarunum, sum drekka hetta veika ølið. Teir skulu bara hava tað hvønn einasta dag.

**Eingin heimabrenning**

Eingin nólsoyingur, Sosialurin hevur tosað við, vil kortini vera við, at Nólsoyarbygd hevur havt størri ampa av rúsdrekka enn aðrar bygdir í Føroyum.

– Nei, tað dugi eg ikki at hugsa mær. Tað eru nógvar bygdir, sum hava stórar trupulleikar av rúsdrekka, sigur uppilagsti sjómaðurin.

– Teir drekka aðrastaðni eisini og bryggja við, sigur handilsmaðurin Gabriel. Eg síggi ongan skaða í Fredrikki. Um ein einstakur fellur, so hevði hann follið kortini. So drakk hann okkurt annað enn Fredrikk.

Harafturat leggja fleiri nólsoyingar dent á, at bryggingin í Nólsoy hevur ið hvussu so er havt eitt gott við sær. Hon hevur hildið heimabrenningini frá durunum.

– Destillatiónsapparat er einki í Nólsoy, og heimabrenning finst aðrastaðni í landinum, tað vita vit. Fredrikk er ein mildur drykkur. Tað er sukur, vatn og ger. Tað er einki annað enn tað, siga nólsoyingar.

**Ikki í søguna**

Í handlinum hjá Gabriel Hansen fræ ttist, at ókunnumenn eru komnir til bygdar, at frætta um Fredrikk.

– Eg hevði ein dunk fyrr í tíðini, men hann kruvdi eg, tí tað bleiv ov nógv av tí góða, sigur ein fryntligur útróðrarmaður, og vendir sær síðani til ein mann, sum júst er komin innar í handilin.

– Hann spyr um nakar ger tað í dag, sigur hann við tann nýkomna.

– Ja, gev honum eitt glas av Fredrikk frá tær! tekur tann blíða krambakvinnan undir. Men tann nýkomni hevur ongan hug at sýna blaðmanni blíðskap, sum soleiðis kemur til bygdar at bidda um Fredrikk.

– Tað verður tú um. Tú kanst drekka frá onkrum øðrum, svarar hann avgjørdur.

Og soleiðis fara vit inn aftur til Havnar. Uttan nakað prógv um, at Fredrikk verður bryggjaður í Nólsoy longur. Men við nógvum útsagnum um, at hann skal vera útdeyður.

Tó so. Onkur er, sum ikki hevur avskrivað hann enn.

– Nei, Fredrikk sleppur ikki í søguna, slær handilsmaðurin Gabriel fast.

– Tað er minkað øgiliga nógv og eingin fær í lag at bryggja Fredrikk longur. Men eg vænti ikki, at hann hvørvur kortini, tí rúsdrekka er so dýrt at keypa, slær hann fast.



TÓMIR KAGGAR. **Ein bøllufløska var tann einasti bryggingarkaggin vit fingu eygað á í Nólsoy. Tað skuldi nógv til fyrr enn eigarin játtaði at vísa okkum fløskuna hóast hon var tóm. Hann var bangin fyri at vera handtikin.**






SKÁL. **Fredrik sóu vit einki til, men eitt glas av heimagjørdum rabarbuvíni, slapp blaðmaðurin at smakka.**

## Uppskriftin

Tilfarið, ið verður nýtt til Frederikk, er vanligar húsarhaldsvørur. Hann verður bryggjaður í bøllufløskum, sum eru roknaðar til endamálið, ella í stórum plasdunkum. Til tess at vísa hvussu lætt tað í roynd og veru er at gera heimabryggið prenta vit tvær uppskriftir, ið ein garvaður bryggjari í Nólsoy hevur latið okkum:

**Vanligur Fredrikkur:**
5 kg melis
2 kg putursukur
3-5 pk. rosinur
30 litrar av vatni
5 pk. ger.
Hita vatnið og lat melis og putusukur útí. Rør runt til sukrið er upployst og koyr ger og rosinur í. Dunkurin skal standa við uml. 26 hitastigum í 10 - 14 dagar. Tá verður styrkin uml. 8 -11 %.

**Lyn-Frederik:**
2 kg melis
1 kg putursukur
2 pk. rosinur.
50 - 60 pk ger.
Sama mannagongd sum til vanligan Frederikk, men dunkurin skal nú standa við uml. 36 -38 hitastigum og bert í uml. 36-48 tímar. Tá verður styrkin uml. 5-6 %.

### Ávaring!

**Tað er ólógligt at gera heimabryggj. Brot á lógina kann verða revsað við sekt, hefti ella fongsli.**

## Navnið



• Bryggið kann geva herviligar luftstingir, tá ið tað ikki er nóg væl útgerað. Hetta er vanligasta forkláringin upp á navnið Fredrikk.

• Sigst eisini hava kongligan uppruna. Onkur skal einaferð hava sagt soleiðis, tá ið hann smakkaði Fredrikk: »Hetta var tó ein kongaligur drykkur«. Tá var Fríðrikur níggindi kongur í Danmørk, og kongsnavnið hekk við nólsoyardrykkinum.

# Ongantíð stovubærur

Høgt lufttrýst í maganum, men eingir timburmenn. Meiningarnar eru ymiskar um drykkin, sum slapp at standa undir borðinum, tá brúdleyp var

Hóast sítt kongaliga heiti hevur Fredrikk eftir øllum at døma ikki verið roknaður millum teir fínastu drykkirnar í Nólsoy. Fredrikk hevur verið brúktur í sambandi við nátatíð og heystfjøll, og kanska sum ískoyti til jólakassan. Hann hevur verið hildin innanfyri teir fýra veggirnar, og er ongantíð sloppin til háborðs, siga nólsoyingar.

– Til brúdleyp var Fredrik við, men hann stóð alla tíðina undir borðinum. Hann kom ongantíð alment fram.

– Tað hava altíð verið fólk ímillum, sum ikki hava dámt tað, sigur handilsmaðurin Gabriel Hansen.

– Fredrikk hoyrir heima í kjallaranum. Tað hevur verið sætt sum nakað vánaligt nakað, sigur ein sjómaður um tey 50, sum er heima fyri tíðina.

**Mátti bindast inn**

Nólsoyingar hava sína egnu Fredrikksvísu. Har verður sungið, at Fredrikk „smakkar av rennu og flóri í senn". Men vísan er í roynd og veru eitt fornermilsi móti nólsoyardrykkinum, heldur ein miðaldrandi tilflytari.

– So illa smakka hann ikki, um hann er væl gjørdur. Gamaní kann hann smakka illa av geri, men tað venist tú við. Hann kann eisini smakka væl. Tað er eingin fløska av Fredrikk, sum smakkar eins, sigur tilflytarin.

Lyn-Fredrikk er tiltikin. Hann fær nógvan hita, so at hann er klárur at drekka eftir fáum døgum. Prosentini eru týdningarmeiri enn smakkurin.

– Tað verður einki botnfall, so tað verður øgiliga grumsut, men sterkt. Tað skjótasta at bryggja við er við ráum eplum. Tað er bara so óluksáliga ringt fyri magan. Eg havi einaferð gjørt tað og tá mundi eg siglt av, sigur sjómaðurin um tey fimti.

Og onkuntíð man lufttrýstið hava verið høgt. Einaferð, vilja nólsoyingar vera við, mátti ein maður vindast inn í eina bjargalínu, eftir at hava drukkið Fredrikk. Vandi var fyri, at hann fór at spreingjast.

**Liggur væl á**

Positivi tilflytarin heldur hinvegin, at tað er ein fyrimunur, at tú veitst hvat ið er í Fredrikki. At hann ikki er fyltur við svávuldioxid, tilsetningsevnum og øðrum ókendum.

– Tað skal øgiliga nógv til fyrr enn tú fært timburmenn av Fredrikki. Orsøkin man vera tann, at Fredrikk ikki er fullur at tilsetningsevnum. Tær fáar ferðirnar eg havi havt ein ordiligan girara av Fredrikki, havi eg allar hægst havt kenning dagin eftir. Hann er heldur trekur, at fara og virka, men afturfyri so liggur hann væl á, sigur hann.